# Besta hálið í 6 ár

ALFRED OLSEN

Sambandstingmaður



Veruleikan innan okkara høvuðsvinnu varð sera væl lýstur í Sjónvarpinum, sum hevði verið ein túr við Magnusi Heinasyni. Har sóu vit, at tað eina hálið var púra miseydnað, tí ongin fiskur var í, meðan trolið í næsta hálinum var á tremur við toski, sum hevði eitt virði upp á uml. 250 tús. kr.

Henda gongdin og hesin veruleiki er tann, sum føroyski sjómaðurin altíð hevur livað við, tí ta einu setuna hevur hann drigið svart, men tann næsta hevur verið full av fiski. Tað eina hálið er onki í trolinum, meðan tað er fult tað næsta, og sama ger seg galdandi hjá nótaflotanum og alingini.

Undir slíkum nattúrugivnum umstøðum virkar okkara fiskivinna, og tað er undir hesum veruleika, at hon er og verður okkara høvuðsvinna, ið megnar at útvega pening til landið og stendur fyri góðum 90 % av okkara útflutningi.

**Fiskifrøðingar**

At fiskifrøðingar hava sín fakliga kunnleika um lívið í sjónum er ongin í iva um, og at teir brúka henda kunnleika er púra rætt, men hvussu langt áskoðanirnar hjá fiskifrøðingunum liggja frá teimum hjá sjófólki okkara, kom týðiliga fram í sjónvarpssendingini.

Fiskifrøðingarnir siga t. d., at lítið er til av toski undir Føroyum, og við útgangsstøði í tí fyrra hálinum, sást greitt á teimum, at teir nú høvdu fingið prógv fyri, at teirra teori var røtt; - ongin toskur var undir Føroyum. Men tá ið tað næsta hálið kom á dekkið, og vit sóu eitt trol á tremur við góðum toski, var týðiligt, at hetta var ikki tað, sum fiskifrøðingarnir høvdu roknað við, og at tað var í mótsøgn til teirra teori og útsagnir.

**Sjómenn**

At sjófólk okkara hevur ein serstakan kunnleika til lívið í sjónum er ongin ivi um, og at teir brúka henda kunnleika fult út, er heldur ongin í iva um.

Sjómen siga, at toskur er undir Føroyum, og við útgangsstøði í tí fyrra hálinum hjá Magnusi Heinasyni, siga sjómenn, at hetta kann ikki passa, og at tað vísir ikki allan sannleikan. Tí koyra teir trolið út aftur og rokna altíð við, at hesa ferð verður fiskur í trolinum, og teir fáa prógv fyri hesum ferð eftir ferð, tá ið trolið kemur á dekkið fult av fiski, ja til tíðir besta hál í mong ár. Sama er við línubátunum, sum ein dag draga svart, men næsta dagin fáa nógvan fisk. Sama er við snellubátunum, partrolarunum, nótabátunum og øllum sum fáast við fiskivinnu.

**Veruleikin**

Øll sum hava fingist við og sum fáast við fiskivinnu, mugu ásanna, at ongin dagur er eins, tí tað eru góðir dagar og ringir dagar, onki ár er líka, tí tað eru vánalig ár og tað eru góð ár.

Hjá línubátum kann góður fiskiskapur í tveir dagar bjarga túrinum, - hjá trolarum somuleiðis, og hjá nótabátum kann eitt kast ella ein dagur verða bjargingin. Eitt gott ár gevur somuleiðis lív aftur í okkara aluvinnu.

Hesin túrurin við Magnusi Heinasyni, ið vit saman við SVF fingu loyvi til at vera við til, vísti týðiliga, at teoriin hjá fiskifrøðingum ikki altíð er heilt eftirfarandi. Tí hevði verið ynskiligt, at fiskifrøðingar og fiskimenn drógu eina línu, tá ið talan var um fiskivinnu!

At fiskiskapur undir Føroyum er betur í ár enn tey undanfarnu árini, er ein positiv staðfesting, sum gevur vón um, at skip og bátar fáa meira burturúr í ár. Hetta fegnist eg um og vóni, at fiskaprísurin eisini kemur at hækka út á árið.

# Álvarsligar broytingar í lønarútgjaldingum

JÓGVAN VIÐ KELDU



**Privatu lønirnar lækka, almennu lønirnar hækka. Hallið á fíggjarlógini fer uttan iva upp um trífjórðingsmilliard 2009**

Í okkara lítla og viðbrekna samfelag koma broytingarnar í so harðliga á okkum, og týðiliga sæst, hvussu almenna lønarkontoin í stórum yvirhálar privatu, samstundis sum inntøkur landskassans lækka.

Tøl kunnu sjálvandi setast upp ymist, men merkisvert er at síggja, hvussu lønarhækkingarnar í almenna geiranum bara økjast, meðan lønarútgjaldingar í fiskivinnuni tilsvarandi støðugt lækka.

Tað sum nú ger seg galdandi, er tó nógv ógvusligari. Taka vit munin á 2006 og 2009, er bara fiskivinnan, sum fellur í lønarúgjaldingum, meðan í 2007 kemur eisini ferð á niðurgongdina í byggivinnuni, og í 2008 kemur so tænastuvinnan eisini við í einum minus, um vit hyggja at januar- og februarmánaðunum.

Soleiðis er tað bara almennu lønirnar sum økjast, og hækka í stórum. Tó skal sigast fyri rættleikans skuld, at frá í 2007 hækkaðu allar lønarútgjaldingarnar, men tað broytir tó ikki heildarmyndina.

Víst verður til hjáløgdu mynd við Hagstovuni sum talkeldu.

**Fjórði geirin klippir hinum trimum**

Vit eiga at hava í huga, at teir fyrstu tríggir geirarnir, Fiskivinna o.a., Bygging etc. og Privatar tænastur eru bundnir av og knýttir at marknaðinum, og halda fjórða geiran, – almennar lønir – á lívi, hesin fær játtanir úr lands- og ríkiskassanum. Fjórði geirin almennar lønir - er mastodontur, sum tungur, fyri ikki at siga vónleysur, er at venda.

Men onkur klókur hevur viljað verið við, at fjórði geirin kann liva av at klippa øllum hinum trimum, tí soleiðis liva onnur samfeløg. Hvørji so hesi eru!

Eingin ivi er um, at 2009 fer at koma við meiri týðiligum lønarmunum millum privat og alment. Við hesum kann kanska roknast við halli á fíggjarlógini, sum fer yvir trífjórðings milliard krónur við lækkandi landskassainntøkum.

**Sermerktar broytingar í lønarúgjaldingum - við Hagstovuni sum keldu - fyri januar og februar 2006, 2007, 2008 og 2009, tala sín álvarsliga veruleika:**

| | 2006 | 2009 | munur í kr. |
|---|---|---|---|
| | mió.kr. | mió. kr. | mió. kr. |
| Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 199 | 164 | ÷35 |
| Bygging o.o. tilvirking | 119 | 134 | +15 |
| Privatar tænastuvinnur | 295 | 349 | +54 |
| Almenn o.o. tænasta | 331 | 412 | +81 |
| | **2007** | **2009** | **munur í kr.** |
| Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 236 | 164 | ÷72 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 141 | 134 | ÷7 |
| Privatar tænastuvinnur | 328 | 349 | +21 |
| Almenn o.o. tænasta | 353 | 412 | +59 |
| | **2008** | **2009** | **munur. í kr.** |
| Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 198 | 164 | ÷34 |
| Byggivinna o.oo. tilvirking | 158 | 134 | ÷24 |
| Privatar tænastuvinnur | 371 | 349 | ÷ 22 |
| Almenn o.o. tænasta | 381 | 412 | +31. |

# Skúgvið tað gloymda umráðið í Føroyum

JÓNFINN OLSEN

Miðvágur

Hendan polittiska støða er syrgilig, samstundis sum tað verður sagt, at útjaðarin skal ikki gloymast men mennast. Men eg haldi ein kann ikki halda seg frá at gera viðmerkingar í hesum máli, nú Skúvoy hevur bíðað og bíðað eftir betri umstøðum. Skammið tykkum sum tosa um útjaðarapolitikk, fy for den.

Gerið útbyggingingina í Skúgvi lidna, so oyggin kann lívbjarga sær. Nú hevur hetta tikið tykkum politikarum fleiri ár um at fáa avgjørt, og so strika tit játtina við einum pennastrokið. Úrslitið er, at fólkatalið í oynni bara minkar og minkar. Ístaðin fyri tit gjørdu tað gjørligt, at fólk fluttu til oynna aftur, eisini fluttu møguliga nýggir tilflytarar út til Skúoyar, og so er hettar ein perla fyri ferðavinnuna, so her kann heldur sigast, at nógv er at vinna.

Nei, tit kunna fara arðastaðni eftir sparingum, tí Skúoyggin kann draga nógv fólk hagar til, og tí er íløgan ikki onkisverd, men framtíðarmennandi.

Takið tykkum saman ella farið til hús, tað danska fólkatingið hevur tað evsta valdið álíkvæl.

(her verður hugsað um so nógv ting, so um hernaðarlógávuna og nú fólkaatkvøða skal verða so skal Føroya Løgting ikki blandast uppí hvat danska Fólkatingið hevur samtykt, gerið so væl, soleiðis er tað bara, soleiðis kundu vit hildið á).

Og so sita nakrir politikarar í Føroyum og avhøvda allan framburð í teimum smáu plássinum.

Álvaraos hvat hugsa tit fyri tykkum? Bátahylurin suðuri í Skúgvi kann ikki hava ein bát liggjandi í brimi, og tað hevur verið lovað teimum at hettar skal broytast so at ein sleppur frá at draga bátin upp hvørja ferð hann hevur verið til útróður, ella hvussu veðrið broytist og heldur ikki er møguleiki at leggja at í óveðri úti í Skúgvi, Hvørjari øld liva vit í? Nei, óskilið valdar enn einaferð við hesum máli, har játtanin var samtykt í fíggjarlógini fyri 2009, og so nú skal løgtingið taka eina samtykt aftur og siga hettar er ikki samtykt álíkavæl, vit (løgtingið) strika bara játtanina til Skúoyar aftur.

Kunna vit hava álit á løgtinginum? Ella kunna vunnin rættindir bara takast aftur? Hvussu er støða okkara við fólkaræðinum í Føroyum?

Eg eri klárur yvir, at ávísir politikkarar fara at siga, hettar eru jú bara justeringar, men so lætt kunna tit ikki handfara ávísar borgarar í landinum. Útjavnan, frambur, fólkaræðið og sosialdomokrati. Hvar eru hesi slagorð?

Setið hesa játtan aftur beinanvegin, um nakar sosialdemkratiskur politikkur er skaptur í tykkum. Fólkið í Skúgvi skal eisini liva. Samstundis sum alt Føroyar kann njóta gott av hesum, ein ferða perla yvir mangar.

Við vón um at tit politikarar hugsa um frambur heldur enn stíga tvey stig aftur samstundis sum tit royuna at ganga fram, núverandi úrslit er tað ein katastrofal afturgongd, tí eitt verður sagt og annað verður gjørt (eitt stig frammeftir og tvey til trí stig aftureftir), hvat er egintliga meiningin??? Avtofta smáplássini, strika ferðavinnuna, ongan frambur o.s.v. ja vit kundu hildi á???